# FM í talvi 2003

ATLANTIC AIRWAYS Cup

Allir telvarar vera við hesum bodnir at kappast um FM-heitið í talvi fyri einstaklingar á Læraraskúlanum í Havn í døgunum 12. - 19. apríl 2003

Bólkabýtið verður soleiðis:

**Landsliðsbólkurin** verður skipaður við 16 telvarum, 6 útlendingum og 10 føroyingum. 11 umfør eftir FIDE Schweizer skipanini verða í landsliðsbólkinum.
**1. bólkur** verður skipaður við 10 telvarum, allir ímóti øllum. Hugsunartíðin í Landsliðsbólkinum og 1. bólki verður 90 minuttir + 30 sekund fyri hvønn leik til alt talvið.
**2. bólkur** verður skipaður eftir FIDE Schweizer við 8 umførum. 2. bólkur hevur óavmarkað tal av telvarum.
**Unglingabólkurin** verður skipaður eftir FIDE Schweizer við 8 umførum. Aldursmarkið í unglingabólkinum er 20 ár. Hugsunartíðin í 2. og unglingabólkinum verður 120 minuttir til 40 leikir og 30 minuttir til restina.
**Eldrabólkurin** verður skipaður við 6 umførum í FIDE Schweizer ella allir ímóti øllum. Telvað verður 17., 18. og 19. apríl. Hugsunartíðin í Eldrabólkinum verður 60 minuttir til alt talvið. Telvarar í Eldarbólkinum skulu vera fyltir 50 ár, tá kappingin byrjar.

Byrjað verður at telva hvønn dag kl.14. Teir dagar dupult umfør eru, telva bólkarnir 2 umfør, kl.10 og kl. 16.

Luttøkugjaldið er: 1. og 2. bólkur 350 kr., Unglingar og Eldrabólkurin 200 kr.

Tilmeldingin fer fram við at gjalda luttøkugjaldið á kontonr. 9181-123.734.0 í Føroya Sparikassa, ella 6460-150.552.3 í Føroya Banka.

Seinasta freist at boða frá luttøku er fríggjadagin tann 4. apríl 2003.

Fleiri upplýsingar eru at finna á www.faroechess.com



Havnar Telvingarfelag

---

Dámar tær væl
at fáast við hár ella smyrsl
- so er hettar kanska
nakað fyri teg.

Skúlin tekur bara 2 ár.
Tú er vælkomin at senda
eina umsókn sum skjótast.



Tann Føroyski
Hárfríðkanarskúlin
Postboks 1047
FO-110 Tórshavn
Tel. 262537 ella
Tel. 311683 eftir kl. 20.00

Sosialurin 311820

---

## Arbeiðshandskar

til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf

Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820

---

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

---



## Hús ynskjast til leigu í Vági

Í samband við eitt arbeiði ynskja vit at leiga eini hús í Vági í umleið 6 mðr. pr. 1. apríl.

demich

**Spyr eftir Torbjørn Tlf. 21 10 71**

---



HESTPRENT spf.

**BØKUR, BØKUR, BØKUR**

og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

---

## EYSTUROYINGAR

**Nýtt skeið byrjar hósdagin 27. mars**

**Tilmelding hjá:**
**Hugo Kristiansen, tel. 225 225**
**Ole Lykke, tel. 220 972**

**Eysturoyar Teoriskúli**

Sosialurin - 311820

---

## Til sølu

Sproytikabina klár til uppsetan.

**Tlf. 424232/214232**

---

## Hús í Vági

Hús á Lágabø í Vági til sølu.

**Tlf. 373874**

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3496, P/F 21.01.2003, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:**
06.03.2003.
**Nýtt navn:** P/F O. C. Trol
**Nýggj adressa**: 450 Oyri
**Nýggj Kommuna:** Sunda Kommuna
**Nevnd**:
**Farin úr nevndini:** Jean Djurhus, Kovalág 2, 100 Tórshavn (formaður), Torbjørn Andreasen, Niðaragøta, bygn. 2, íbúð 8, 188 Hoyvík og Leivur Mohr, Steinsgøta, 410 Kollafjørður.
Innkomin í nevndina: Niels Winther Poulsen, Millum Gilja 8, 188 Hoyvík (formaður), Ólavur Fløtt, 470 Eiði, Knudina Joensen, 450 Oyri, Christian S. P. Joensen, 450 Oyri og Hans Joensen, 450 Oyri.
**Stjórn**:
**Farin frá sum stjóri**: Allan Terji Skaalum, gundadalsvegur 37, 100 Tórshavn.
**Innkomin sum stjóri:** Sofus Poulsen, Aggusteinsvegur 1, 188 Hoyvík.

*Skráseting Føroya tann 20. mars 2003*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niÝanfyri standandi fráboÝan:**

Skrásetingar-nr. P/F 5, P/F Havnar Timburhandil, 100 Tórshavn.

**ViÝtøkur broyttar:**
28.02.2003.
**Nýtt hjánavn:** P/F Timburhandilin (P/F Havnar Timburhandil)

*Skráseting Føroya tann 20. mars 2003*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2356, Sp/f Nevið Fiskaeksport, 600 Saltangará.

**Viðtøkur broyttar:**
07.12.2002.
**Nýtt hjánavn:** Sp/f Nevið (Sp/f Nevið Fiskaeksport)

*Skráseting Føroya tann 20. mars 2003*
*Kristin Balle*

---

Sosialurin



# LANDMÁTARI

MUNIN

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Munin er at víðka um og hækka tænastu- og góðskustigið innan uppmáting og avseting.
Í hesum sambandi verður søkt eftir landmátara.
Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður, kann byrja skjótast gjørligt.

**Uppgávurnar hjá Munin**
Munin átekur sær uppmáting og avseting fyri kundar eftir áheitan. Talan er um uppmáting av kloakk og vatni, avsetingar av vegum, uppmátingar av lendi osfr.
Uppgávurnar fevna eisini um klárgerð og hagreiðing av mátidata. T.d. gerð av tvørskurðum og hæddarkurvum.

Kundarnir eru kommunur, entreprenørar, arkitektar, almennir stovnar, privatir kundar o.l.
Til uppmáting og avseting verða nýtt Leica tól:
- *RTK/GPS 530*
- *TPS1103.*
  *(Einmansstýrd totalstatión)*

Til hagreiðing av data verður brúkt:
- *ESRI ArcView*
- *ESRI ArcInfo*
- *Hugin*

**Uppgávur hjá landmátaranum**
Uppgávur hjá landmátaranum verða m.a. at taka sær av:
- klárgerð og hagreiðing av mátidata.
- uppmáting við RTK/GPS 530
- uppmáting við TPS1103
- viðlíkahald av kortum

**Førleikakrøv**
Av okkara komandi starvsfelaga ynskja vit, at viðkomandi hevur:
- útbúgving í og/ella royndir við landmáting
- royndir við og kunnleika til GIS og CAD skipanir
- góðan tænastuhugburð
- góðan edv-kunnleika
- góð evni at arbeiða málrættað
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni
- góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.
Samráðast kann um løn og arbeiðstíð.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:
**Munin**
**Dr. Jakobsensgøta 18**
**FO-100 Tórshavn**
og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2003.
Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Boga Jacobsen ella Róa Henriksen á tlf. 35 36 00 ella á e-post: munin@munin.fo.



SISERO 351800

*Sp/f Munin er eitt kt-virki við serkunnleika innan GIS*, skráseting og uppmáting.*
*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni fevnir um ráðgeving innan GIS*, uppmáting og avseting av lutum og skráseting av data hoyrandi til hesar lutir.*
*Fyritøkan varð stovnað í november 1998 og svarar talið á starvsfólkum í dag til 3 fulltíðarstørv.*
**GIS - Geografisk Informatión Skipan - er skipan, ið fevnir um skráseting av geografiskum lutum og data hoyrandi til hesar lutir.*

TÁ KORTIÐ GER MUNIN ...

---

## Til sølu



Toyota Avensis 2.0 sol.Turbo diesel intercooler, árg. 1998, km 94.000, nýsýnaður, kr. 138.000,-

Vælútgjørdur við el rútum, sportfelgum, fjarstýrt sentrallás og mangt annað…

**tlf. 212345**

Bilumvæling
- Skaðaumvælingar og lakkering

---

## Aðalfundur

**Føroya Náttúruverndarfelag hevur ársaðalfund hin 12. apríl kl. 14.00 á Hotel Hafnia.**

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3521
**Navn**: Sp/f H. J. Asfalt
**Adressa:** 660 Søldarfjørður

**Kommuna:** Runavíkar Kommuna
**Stovningardato:** 13.03.2003
**Viðtøkudato:** 13.03.2003
**Kapitalur:** Kr. 298.000,00
**Inngjaldingarháttur:** :
**Kontant kr.** 298.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Jóhannes Rasmussen, Gerðisvegur 12, 660 Søldarfjørður og Heri Jacobsen, Undir Fossum 67, 700 Klaksvík.
**Stjórn:** Jóhannes Rasmussen, Gerðisvegur 12, 660 Søldarfjørður og Heri Jacobsen, Undir Fossum 67, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjórunum hvør sær ella í felag.
**Grannskoðari**: : Sp/f Grannskoða jóannes Skorheim, Klaksvíksvegur 28, 700 Klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 13.03.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil, handverk, harundir asfaltering, entreprenørarbeiði og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 20. mars 2003*
*Kristin Balle*

---

## Frítíðarløn 2. mai 2003

Til tykkum, ið eiga frítíðarløn til góðar 2. mai 2003.

Er bústaður tín broyttur, síðani flytingin varð fráboðað Fólkayvirlitinum, vil "slippurin" ella fráboðanin koma retur til Frítíðargrunnin.

Fyri at sleppa undan hesum vil Frítíðargrunnurin vinarliga heita á tykkum um at fráboða Fólkayvirlitinum nýggja bústaðin.

Frítíðarlønin fyri 2003 fer inn á somu kontu sum í fjør. Um tit ynskja hetta kontunummar broytt, verða tit biðin um at fráboða okkum nýggja kontunummarið.

Tit kunnu upplýsa okkum um broytta kontunummarið við at útfylla fráboðanina niðanfyri og senda okkum hana áðrenn 14. apríl 2003.

Eisini ber til at senda upplýsingarnar á heimasíðu okkara: www.tollskatt.fo

Spurningar kunnu svarast á telefon 37 10 51.
Telefonin svarar mán. - frí. kl. 9.00 - 15.00, tó hós. kl. 9.00 - 17.30.

| | |
|---|---|
| P-tal: | |
| Navn: | |
| Bústaður: | |
| Postnr. og bygd/býur: | |
| Peningastovnur: (be rt føroyskur) | |
| Kontunummar: | |

_______________ , / 2003 _______________
Undirskrift

Fráboðanin skal sendast til: Toll- og Skattstovu Føroya
Suðuroyar Øki
Postsmoga 69
FO-800 Tvøroyri